


# HÆGSTA TILBOÐIÐ ER 14 MILLIÓNIR

**Tað segði Arnfríð Hentze á Hvonn Live leygarkvøldið. – Eg havi fingið fleiri tilboð frá mannfólki, summir bjóða sær at venja hundin, aðrir at passa seyðin, og uppaftur aðrir siga, hvussu nógvar milliónir teir eiga, segði Arnfríð Hentze**

Leo Poulsen

Bragdliga bóndakonan úr Sumba er væl skorin fyri tungubandið. Tað fingu tey at hoyra, sum vóru á Hvonn og tey sum lurtaðu eftir Hvonn Live á Rás2 leygarkvøldið. Hvonn Live vertirnir høvdu verið runt Havnina við Arnfríð Hentze og stylað hana upp. Hon var hjá frisør, fekk lagt make-up, fekk nýggj klæðir og nýggjar skógvar.

- Tey siga, at eg eri yngd 20 ár, segði Arnfríð Hentze á Hvonn Live. Tá vertirnir fregnaðust um, hvussu dagurin í Havn hevði gingið, helt hon, at tað hevði verið bæði strævi, spennandi og troyttandi.

- Tað er líka við, at seyðirnir ikki kenna meg aftur, helt hon skemtandi fyri.

Annars er tað ikki stórur munur á at vera hjá frisør í Havn og har suðuri.

- Tað tók tveir tímar í Havn, og tað plagdi tað eisini at taka har suðuri, segði Arnfríð Hentze.

Vertirnir vildu vita, um hon sjálv gjørdi av, hvat frisørur og make-up kvinnurnar gjørdu. - Tær spurdu pent, um tær kundu gera hetta og hatta, og eg bað tær bara gera tað, sum riggaði






